# Keyp trygt á netinum – ’Verified by Visa’ og ’MasterCard SecureCode’

Í sambandi við handil á netinum hava Visa og MasterCard gjørt eina nýggja trygdarloysn: ’Verified by Visa’ og ’MasterCard SecureCode’.

Tá tú nýtir títt Visa Electron, Visa/Dankort ella Mastercard á netinum og kemur fram á ’Verified by Visa’ ella ’MasterCard SecureCode’, skal tú upprættað eitt loyniorð, ið tú sjálv(ur) velur.

Tú kann antin velja at tilmelda teg nú á www.pbs.dk/sikkernethandel ella fyrstu ferð, tú brúkar kortið í einum handli, ið er tilknýttur ’Verified by Visa’ ella ’MasterCard SecureCode’. Um tú hevur fleiri ymisk kort, skal tú upprættað eitt loyniorð/SecureCode til hvørt einstakt kort.

Á www.pbs.dk/sikkernethandel kann tú eisini broyta loyniorð ella aðrar skrásettar upplýsingar.

Handlar, ið eru tilknýttir nýggju trygdarloysnini, fara at heita á teg um at rita loyniorðið inn sum kvittan fyri keypið. Eftir hetta verður greiðslan framd eins og vanlig kortgjalding á netinum.

Handlar, ið ikki nýta nýggju trygdarloysnina, taka ímóti gjaldingum sum higartil.

Handlar, ið eru tilknýttir nýggju trygdarloysnina lýsa við búmerkjunum hjá "Verified by Visa" og "MasterCardSecureCode".

**Tá kortið verður nýtt í sambandi við fjarhandil og í útlendskum handlum**

Tá keypt verður á netinum kann handilin krevja eitt gjald fyri tænastuveitingina. Upphæddin verður upplýst av handlinum og fylgir galdandi reglugerð í avvarðandi landi, um fjarhandil.